Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Uni Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Bústaðir

Spurningur:

Kann landsstýrismaðurin geva eina útgreining av, hvat leiguinntøkurnar hjá Bústøðum seinastu 5 roknskaparárini (2016-2020) eru nýttar til? Her verður hugsað um fyrisiting, viðlíkahald, niðurrindan av skuld v.m.

Viðmerkingar:

Seinastu dagarnar hevur nógv verði skrivað og sagt um Bústaðir og eisini um fíggjarstøðuna hjá Bústøðum. Somikið nógv er komið fram seinastu dagarnar, sum peikar í ymsar ættir, at torført er at fyrihalda seg til, hvat er satt og ikki. Tí ynskir spyrjarin at fáa landsstýrismannin at útgreina og greiða frá, hvussu leiguinntøkurnar hjá Búðstøðum eru brúktar seinastu 5 árini.

Á Løgtingi, 25. oktober 2021

Uni Rasmussen